www.torshavn.fo

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## LEIÐARI TIL BÝARSKIPANARDEILDINA

**Søkt verður eftir deildarleiðara til Býarskipanardeildina.**

**BÝARSKIPANARDEILDIN**

Uppgávan hjá Býarskipanardeildini er fyrst og fremst býarskipanarmál. Tað vil siga at arbeiða við heildarætlan fyri kommununa, býarplanlegging, byggisamtyktum og øðrum planleggingarmálum. Býarskipanardeildin fyriskipar og umsitur eisini smærri verkætlanir hjá kommununi.

**ARBEIÐSUPPGÁVUR**

Sum deildarleiðari hevur tú dagligu leiðsluna um hendi. Tín uppgáva er eisini at menna Býarskipanardeildina soleiðis, at deildin fylgir við tíðini og broytist samsvarandi menningini í samfelagnum. Tú fyrireikar eisini mál til nevndarviðgerð og ert við til at førleikamenna starvsfólkini.

Tórshavnar kommuna bjóðar eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum. Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

**FØRLEIKAKRØV**

Vit sóknast eftir einum deildarleiðara við viðkomandi útbúgving. Royndir innan býarskipan og/ella fyrisitingarroyndir, er ein fyrimunur.

Sum deildarleiðari mást tú virða galdandi reglur og mannagongdir og vísa neyðugt støðufesti. Góð samskiftisevni og góðir samstarvseginleikar eru ein fortreyt, eins og opinleiki fyri avbjóðingum og nýggjum møguleikum. Eisini er neyðugt við einum motiverandi leiðslustíli.

Vit hugsa okkum, at tú ert framsøkin og dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga á føroyskum.

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Starvið verður sett skjótast til ber og lønt í 35. lønarflokki samb. tænastumannaavtaluni (uttan at vera tænastumannastarv) ella sambært avvarðandi sáttmála.

**UMSÓKN**

saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 15. oktober kl. 15.00. Merkið umsóknina „Deildarleiðari til Býarskipanardeildina".

**MEIRA FÆST AT VITA**

um starvið við at venda sær Mikael H. Viderø, býararkitekti, á tlf. 21 19 55, ella Jákup Egholm Hansen, tekniska stjóra, á tlf. 30 20 10.

## BÝARBÓKAVØRÐUR

**Søkt verður eftir leiðara til Býarbókasavnið.**

**BÝARBÓKASAVNIÐ**

Tórshavnar kommuna setti Býarbókasavnið á stovn 1. apríl 1969. Býarbókasavnið er eitt nýmótans bókasavn við trimum deildum: Barnabókasavni, útláni fyri vaksin og lesistovu. Á bókasavninum eru 11 ársverk, og starvsfólkini eru 14 í tali. Bókasavnið eigur umleið 72.000 bøkur og filmar.

Í Tórshavnar kommunu eru 11 skúlabókasøvn og Kollafjarðar bygdar- og skúlabókasavn, sum øll samstarva við býarbókasavnið.

Býarbókasavnið er opið seks dagar um vikuna, og í 2008 var talið av vitjandi 76.626. Ætlanin er í næstum at broyta hølini hjá býarbókasavninum, soleiðis at ein partur av bókasavninum verður í veghædd, og verður hetta eisini ein avbjóðing hjá nýggja leiðaranum at skipa fyri.

Meira fæst at vita um býarbókasavnið á heimasíðuni www.bbs.fo.

**KOMMUNAN BJÓÐAR**

eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum og avbjóðingum.

Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:

- at standa fyri og hava ábyrgd av dagliga virkseminum á býarbókasavninum, bæði mótvegis starvsfólkum og viðskiftafólkum
- at tryggja eitt tíðarhóskandi, mennandi og dygdargott umhvørvi
- at fylgja við og kunna seg um menning á økinum

**FØRLEIKAKRØV**

- Bókavarðarútbúgving
- Royndir í bókasavnsarbeiði
- Royndir í leiðslu og samstarvi
- Góður teldukunnleiki og áhugi fyri kunningartøkni
- Góður kunnleiki í føroyskum í skrift og talu

**PERSÓNLIGIR EGINLEIKAR**

Umráðandi er, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi, dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið á bókasavninum og kunna ganga á odda.

**SETANARVIÐURSKIFTI**

Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið, í 8. lønarflokki.

Býarbókavørðurin hevur tilvísing til mentamálaleiðaran.

**PERSÓNLIGIR EGINLEIKAR**

Umráðandi er, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi, dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið á bókasavninum og kunna ganga á odda.

**MEIRA FÆST AT VITA**

um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, á tlf. 30 20 10.

**UMSÓKNIR**

saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 21. september 2009.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk, og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA